

Tónleikur

# Týr:
# Hart arbeiði at klíva upp til toppin





*Heri Joensen er familjumaður, lærari, sangskrivari og oddamaður í Týr. Helvtina av árinum spælir hann víkingametal fyri fullum útblástri kring heimin, og hina helvtina er hann heima í Runavík við familjuni og undirvísir*

**Týr fresa avstað kring heimin; 100 konsertir uttanlands bara í ár, og gittarleikarin Terji Skibenæs hevur fyri kortum undirskrivað avtalu við Ibanez, ein av heimsins størstu gittarframleiðarum. Her heima frættist tó óvanliga lítið um bólkin, men í dagsins blaðið tosar Sunneva H. Eysturstein við Hera Joensen, familjumann, lærara, sangskrivara og oddamann í Týr, um hvat í botn og grund rørist hjá bólkinum bæði her sum úti**

SAMRØÐA
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Týr hava ikki verið nakað serliga sjónligir á føroyska tónleikamarknaðinum seinastu árini; hvørki í miðlum ella á pallum. Tað er ikki fyrr enn nú í seinastuni, síðani fløgan Land varð útgivin í vár, at fokusið er byrjað at koma aftur á bólkin her heima á klettunum. Men hví hevur so lítið verið at sæð til Týr her heima?

- At vit ikki hava verið so nógv frammi í Føroyum seinastu árini, er okkara egna skyld. Um mann skal vera sjónligur, má mann gera tað sjálvur. Mann kann ikki vænta, at onnur gera tað fyri seg. Ert tú ikki spildurnýggjur og spennandi ella sjálvur virkin við at senda uppdateringar um tíðindi út, dettur tú niður ímillum. Men hetta hevur nú eisini verið orsakað av, at vit hava management í Eysturríki, og teirra fyrsti prioritetur fyri marknaðarføring ikki hevur ligið í Føroyum. Vit hava arbeitt hart í langa tíð fyri at koma fram aðra staðni. Tað hevur riggað, og tíðin er nú komin til, at mann aftur vendir eyguni móti heimlandinum og fjepparunum her, greiðir Heri Joensen, oddamaður í Týr, frá.

**Umfatandi sáttmáli og freistandi tilboð**

Týr skrivaðu sáttmála við útgávufelagið Napalm Records í januar 2006. Avtalan ljóðaði uppá, at teir skuldu endurútgeva fløguna Eric the Red (sum kom út hjá Tutl í 2003) umframt at geva tríggjar originalar fløgur út, sum Napalm skuldi gjalda eina ávísa upphædd fyri. Nú hava teir givið tvær originalar fløgur út hjá teimum, Ragnarok og Land, men beint áðrenn Land kom út, fekk bólkurin tilboð frá Napalm um at hækka upphæddina per fløgu, um teir søgdu ja til at gera fýra originalar fløgur ístaðin fyri tríggjar.

- Tað søgdu vit skjótt ja til. Tað er ein heiður at fáa sáttmálan víðkaðan á hendan hátt og vísir bara, at hetta samstarvið riggar, og at vit gera okkurt rætt.

- Vit royndu eina tíð í 2004 at fáa avtalu við Intromental Booking í Danmark, men har var ikki nóg stórur áhugi. Tað steðgaði tó ikki upp har. Tey høvdu nevniliga kontakt við Napalm og sendu teimum eina fløgu hjá okkum, tí tey hildu, at vit vóru akkurát nakað fyri teir. Síðst í 2004, fyrst í 2005 byrjaðu vit samskiftið við Napalm og arbeiddu í umleið hálvt annað ár við at semjast um sáttmálan. Í hesum tíðarskeiðinum vóru onnur plátufeløg, ið vístu áhuga fyri okkum, men sáttmálin við Napalm bleiv at enda so góður, at vit ikki kundu annað enn siga ja til samstarvið og skrivaðu síðani undir í 2006, sigur Heri.

**Mongdin av konsertum fleirfaldaðist**

Týr høvdu verið eitt sindur uttanlands og spælt, áðrenn teir gjørdu samstarvið við Napalm Records. Men tað var langt ímillum og fáar konsertir hvørja ferð. Nú byrjaðu teir knapliga at spæla eina rúgvu úti um landoddarnar. Bara í 2006 spældu teir 50 konsertir, harav einans tríggjar ella fýra í Føroyum.

- Vit komu ordiliga í gongd sum bólkur, tá vit høvdu skrivað